**Leiðbeining til næmingar**

# Skrivlig próvtøka - framseting

## Yvirskipað

- Tú skalt skriva ein samanhangandi tekst, har tú svarar uppgávuorðingini. Teksturin skal hava inngang viðgerð og enda.
- Reglufrástøðan skal vera 1,5, og skriftstøddin skal vera 12.
- Brúka skriftina Times New Roman.
- Sitat skulu frámerkjast við gásareygum.
- Brúkar tú keldur, sum ikki eru partur av próvtøkutilfarinum, skulu tær uppgevast inni í tekstinum, ikki í fótnotu.

## Inngangur

- Inngangurin er vanliga ein hugleiðing um eitt ávíst evni.
- Inngangurin kann enda við einum spurningi, sum leiðir til sjálva viðgerðina, og sum ger, at lesarin verður fangaður og spentur at lesa víðari.
- Tú kanst bíða við at skriva inngangin, til tú ert liðug/-ur við viðgerðina av evninum. Um tú bíðar við at skriva inngangin, til tú ert liðugur við viðgerðina, kanst tú fáa góð hugskot til inngangin, t.d. ein stuttan samandrátt um, hvat tú fert at skriva um (hevur skrivað um).

## Viðgerð

- Um uppgávan er at greina og tulka ein tekst, kann innihaldið skipast eftir einum greiningarfrymli til tekstslagið.
    - Ein frymil er bara ein leiðbeining, og um eitt ávíst punkt í frymlinum ikki er í tekstinum skal tað leypast um.
- Um uppgávan eitt nú er at hugleiða um eitt evni ella at skriva ritroynd er gott við góðum spurningum sum t.d.
    - Hvat er...?
    - Hvør ger...?
    - Hví man tað vera so at...?
    - Er tað ein trupulleiki? Fyri hvønn?

    - Hví er tað ein trupulleiki? Hvørja ávirkan hevur tað á tann, sum ger tað? Hvussu ávirkar tað hini?
    - Hvat kann verða gjørt fyri at avmarka? Hvør kann gera hvat? Hvat kann tann einstaki gera? Hvat kann tað almenna gera?
- Í sjálvari viðgerðini skal eingin serstøk meining koma til sjóndar, uttan so, at tað verður biðið um tað.
- Lýs evnið frá fleiri síðum.

## Endi

- Nevn heilt stutt tað, sum er viðgjørt í tekstinum hjá tær, tak samanum.
- Sig, hvørja hugsan onnur hava, og hvørja hugsan tú hevur.
- Minst til at seta evnið í frásjón við t.d. at samanbera við dagin í dag ella siga frá framtíðarútlitum.

## Góð ráð

- Les allar uppgávuorðingarnar og hugsa teg væl um, áðrenn tú velur uppgávu. Tað er ikki neyðugt at lesa allar tekstirnar.
- Les tekstin/tekstirnar, tú hevur valt at skriva um, fleiri ferðir. Legg merki til viðkomandi teksteyðkenni og skriva hugskot og tankar niður, meðan tú lesur.
- Ger eina disposition.
- Ansa eftir, at tú svarar allari uppgávuorðingini.
- Tillaga inngang og enda, tá ið tú ert liðug/ur, so hesi skapa samanhang í tekstin.
- Nýt í størst møguligan mun føroysk orð heldur enn fremmandaorð.
- Ansa eftir, at setningarnir ikki verða ov langir.
- Rættles væl fleiri ferðir og nýt hjálparmiðlar sum orðabøkur og rættstavara, um hesi eru tøk.